## VIÐMERKINGAR

# Serstøðan

**Helena Dam á Neystabø**
*Javnaðarflokkurin*




Ríkisfelagsskapurin er ein góður felagsskapur, tá ið tær tríggjar tjóðirnar í ríkinum samstarva á jøvnum føti og við virðing hvør fyri øðrum.

Hesin felagsskapur má ongantíð gerast eitt haft, sum bindur partarnar fastar í einari stirvnari hugsan, hvussu tjóðir kunnu samstarva, tí so er eingin menning.

So langt aftur, sum søga okkara gongur, hava Føroyar havt eina serstøðu - tjóðskaparliga, søguliga, mentanarliga og landafrøðiliga - í ríkinum. Tað er umráðandi, at føroyingar altíð halda fast við sína serstøðu, ikki bara tá ið tað snýr seg um samstarvið við hinar báðar tjóðirnar í ríkinum, men eisini um samstarvið við okkara næstu grannatjóðir, ES og annars heimin allan.

Fólkatingsumboðini skulu vera við í arbeiðinum at tryggja okkum okkara rættindi sum tjóð. Hetta er ein stórt avbjóðing, sum krevur, at fólkatingsumboðini vegna Føroya fólk stútt og støðugt eru á varðhaldi og duga at troyta teir møguleikar, sum har eru, til gagns fyri okkara land og tjóð.

Hetta hevur Javnaðarflokkurin dugað.

Gott javnaðarval.

# ES grundlógin og Føroyar

**Annika Olsen**
*Valevni Fólkafloksins til fólkatingsvalið*




Áftaná ein langan og kaldan vetur er várið endiliga í eygsjón.

Hetta várið er tó í vanda fyri at køvast av danskari innliman í eina ES grundlóg, sum vil bombardera føroyska sjálvstýristilgongd 100 ár aftur í tíðina.

Um Danmark við eini fólkaatkvøðu letur seg innlima í ES grundlógina, merkir hetta, at donsk og harvið føroysk uttanríkismál, verjumál, gjaldoyramál og rættarmál verða avgjørd í ES og ikki á Christiansborg.

Týðandi avgerðir, ið hava við Føroyar at gera kunnu sostatt enda á skeivum hondum, og kann hetta fáa álvarsligar avleiðingar fyri føroyskan sjálvavgerðarrætt og endaligan føroyskan suverænitet.

Føroyar skulu ikki inn í ES gjøgum bakdyrnar, harafturímóti skulu vit hevja Føroyar til eina sjálvstøðuga tjóð við egnari grundlóg og við góðum samstarvsavtalum við útheimin.

Sjálvt um hetta svartskygni hvílir yvir okkum, so letur Fólkaflokkurin ikki dyrnar aftur fyri várinum. À Fólkatingi vil Fólkaflokkurin arbeiða fyri, at so hvørt danir flyta ábyrgd til ES, so skal ábyrgdin av hesum málsøkjum automatiskt flytast heim til Føroyar.

Fólkaflokkurin, ið stendur fyri diplomatiið, fyri samstarvi, fyri sjálvbjargni Føroya fólks, er einasti garantur fyri, at eitt nú føroysk uttanríkismál verða flutt heim til Tinganes og ikki til Brussel

Tað hevur tí stóran týdning at fara á val hin 8 februar og seta kross við Fólkaflokkin.

# Hvørjum heldur tú við?

**Bill Justinussen**
*Miðflokkurin*




Eg spurdi ein mann, hvønn hann fór at velja til Fólkatingið. Hann svaraði: Miðflokkin. Eg spurdi hví: Hann svaraði: Tí Miðflokkurin umboðar tað, sum eg standi fyri. Stutt og einfalt. Hesin maður er ein trygd fyri fólkaræðið. Hann var greiður yvir, at til eitt val er ikki talan um eina hestakappríðing, har tú tippar og satsar upp á ein vinnara. Hann veit, at til eitt val velur veljarin tann flokk, sum umboðar hansara sjónarmið best. Nú eru tað tó fleiri valevnir, sum halda taluna vera um eina hestakappríðing, har tey sjálvi hava satsað nógvan pening upp á seg sjálvi. Og tí er tað so umráðandi fyri tey, at tú velur tey, so tey gerast nummar eitt ella tvey og skora kassan, tí annars missa tey nógvan pening. Men hetta er ikki fólkaræði. Hetta er eitt alment uppboð av teimum, sum vilja selja seg allarbíligast. Og tað vil Miðflokkurin ikki vera partur av. Vit eru ikki til sølu, tí sannføringar kunnu ikki seljast.

Miðflokkurin hevur ein boðskap, sum telur, og vit hava eina ætlan, sum veljarin veit um. Vit ætla okkum politiska ávirkan, so samfeløg okkara, bæði føroyska og danska, í størri mun byggja síni viðurskifti á kristnu lívsáskoðanina. Har virðingin fyri Skaparanum, lívinum og næstanum er hægri enn virðingin fyri egnum sjálvsøkni. Tíverri er tað vorðið ein heilt vanlig fatan manna millum, at øll hava rætt til at gera, sum teimum lystir, og at ongin skal órógva tey í hesum. Men hetta er ábyrgdarleys hugsan. Ongin av okkum livir einsamallur á eini oydnari oyggj. Vit liva øll í einum samfelag og hava hvør í sínum lagi ábyrgd fyri hvørjumøðrum.

Miðfloksins sjónarmið eru borðbar ikki bara í Føroyum men eisini uttanlands. Á fólkatingi vil tað vera ein heilt náttúrligur partur at taka lut í dagliga politiska virkseminum, so okkara sjónarmið kunnu vera við til at ávirka rætta vegin.

# Áheitan

**Kári P. Højgaard**
*floksformaður Sjálvstýrisflokkurin*




Nú skulu føroyingar so aftur á val, og lítið man vera at ivast í, at fólkatingsvalið eisini verður eitt barometur fyri, hvussu politikkur Sjálvstýrisfloksins hevur nátt út til veljaran.

Vit vita, at nógvir sjálvstýrisveljarar eru ógvuliga ivasamir, um teir skulu luttaka á einum valið til tveir sessir, sum flokkurin í stevnuskrá síni arbeiðir fyri at fáa avtiknar. Tað er somuleiðis ein krevjandi uppgáva at sannføra veljaran um, at atkvøðan fyri Sjálvstýrisflokkinum kemur til sín rætt, og veljarin harvið fær ávirkan.

Leiðsla floksins tók tað avgerð, at flokkurin skuldi stilla upp. Tí fari eg inniliga at heita á øll sjálvstýrisfólk og tey sum taka undir við stevnumiðum floksins, um at fara talsterk á val og stuðla flokkinum. Vit hava brúk fyri at fáa eitt gott val at staðfesta, at aldudalurin flokkurin eitt tíðarskeið hevur verið í, er farin.

Trúgv kann flyta fjøll og okkara uppgáva er at greiða veljarunum frá, at Sjálvstýrisflokkurin er besta alternativið og ein virðuligur samstarvsfelagi til annan sessin. Fáa vit bróðurpartin av atkvøðunum, ið eru ónøgd við umboðanina hjá teimum fýra flokkunum farna tíðina, part av teimum ivasomu atkvøðunum, umframt góða tilgongd frá teimum ungu, sum fyri fyrstu fer skulu taka støðu, er stríðið vunnið. Síðst men ikki minst fara okkara góðu og trúgvu stuðlar, sum altíð, at gera sítt ítarsta.

Við frímóði bjóða sjey valevnir seg fram á listanum hjá Sjálvstýrisflokkinum, at umboða tjóð okkara á Fólkatingið, har bert Hermansen hevur roynt hetta áður.

# Góðu veljarar!

**Hanna Jensen**
*Fólkaflokkurin*




Vitjið heimasíðuna www.folkaflokkurin.fo og veljið: **Hanna Jensen** undir **Slóðir til valevnini.** Hava tit spurningar til mín sum valevni, kunnu tit senda teldupost til: hanna10@post.olivant.fo

Gott fólkafloksval!

# Vel tú so tað munar

**Jón Guttesen**
*Valevni Tjóðveldisfloksins til Fólkatingið*




Vit hava skapt virðing fyri søk føroya við virkisfýsni og hegni, við áhaldni og støðufesti.

Vit vilja halda fram tína vegna.

Vel tú so tað munar. Gott val.

Lesið Sosialin - so eru tit við